SUNDA KOMMUNA

# Kunngerð

## Rætting til kunngerð 03.01.08

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Sunda kommuna á bygdaráðsfundi tann 17-12-2007 hevur samtykt at gera niðanfyristandandi broytingar í byggisamtyktini fyri Norðskála og Oyrarbakka.

Víðkan av ídnaðarøki (við Búðarsteinar) Norðskála.

Ídnaðarøkið norðan fyri Norðskála verður víðka suðureftir til eina linju gjøgnum markið millum matr. 6a og 17a og eystureftir til eina linju gjøgnum eystara markið marki á matr. nr. 6d.

Broytingin liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð

frá 03.01.08 til 24.01.2008 báðir dagar írokn-aðir

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Sunda kommuna í hendi í seinasta lagi 03-04-2008.

*Oyrarbakki tann 08-01-2008*

**Sunda kommuna**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.



# Hús í Klaksvík

Sethúsaognin matr. nr. 55 og 56, Klaksvík, Stoksoyrarvegur 65, verður seld, um hóskandi boð fæst.

Grundøkini eru til støddar 251 m2 tilsamans. Eldri parturin av húsunum er bygdur uml. 1940 og nýggjari parturin uml. 1950. Í 1987 vórðu húsini umvæld. Tey vórðu bjálvað, klødd við timbri, tak og vindeygu skift. Húsini kunnu nýtast sum tvær sjálvstøðugar íbúðir, ella sum ein eind.

Húsini eru innrættað soleiðis:

**Eldri parturin:**
Miðhædd: Gangur, stova og køkur.
Á loftinum: Lítið kamar, størri kamar, kvistur, baðirúm og úti á lofti.

**Nýggjari parturin:**
Miðhædd: Gangur, køkur og stova.
Loft: 3 kømur og baðiverilsi.

Úthús við kjallara og hjalli standa á stykkinum.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, telefon 353335 ella t-post frp@jura.fo og skrivaran Maibritt Johannessen t-post maj@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

VESTMANNA KOMMUNA

# KUNNGERÐ

Sambært kunngerð nr. 109 frá 7. desember 2007 verður val til løgtingið

**leygardagin 19. januar 2008**

**Atkvøtt verður í ítróttarhøllini í Vestmanna frá kl. 10.00 til 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan støðg.**

Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu hjá fólkayvirlitinum/kommunuskrivstovuni. Sjófólk kunnu eisini atkvøða hjá mynstringarstjórum.

Brævatkvøður skulu verða valstýrinum í hendi, áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar valdagin.

Veljarar, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu møta á valstaðnum, kunnu velja heima **í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða frá áðrenn kl. 16.00 á kommunuskrivstovuni, telefon 470110, ella áðrenn kl. 20.00 hjá valnevndarformanninum, telefon 424211, fríggjadagin 18. januar 2008.**

VALKORT, ið nýtast skulu til valgreiðsluna, verða í næstum send øllum veljarum, ið standa á vallistanum. Um veljari ikki hevur fingið valkort, skal sigast frá á KOMMUNUSKRIVSTOVUNI.

**Minnist til at hava valkortið við!!!**

Loyvt er ikki at seta valplakatir og annað valinum viðvíkjandi á og um valøkið, sum verður roknað frá og við uppkoyringini til parkeringsplássið innanfyri ítróttarhøllina og fram við skúlanum til Gjógvará.

Plakatir og annað valinum viðvíkjandi, ið verða sett upp á nevnda stað, verða uttan ávaring tiknar niður.

*Vestmanna, 8. januar 2008*

**Valnevndin fyri Vestmanna, Válin og Nesið**



## Stríðist tú við vektina?

Ring til mín, eg havi eitt sunt og effektivt "hjálpimiddel".

**Jana 51 71 00 / 31 71 00**
**lr@kallnet.fo**
**www.lr.fo**

Bilur tín verður sum nýggjur

Vit gera smáskaðar, polera, bona og lakkforsegla bil tín við Nano Cover

Quick Repair

Á Hjalla · tlf. 21 33 23



# Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til umboðsmannaval í Gøtu 11. februar 2008, fyri bygdirnar í Gøtu kommunu

4 umboð skulu veljast.

Uppskot um – minst 6 valevni – skulu vera sjúkrakassanum í hendi innan 25. januar 2008.

Eisini verður lýst til umboðsmannaval fyri bygdirnar Hellurnar og Oyndarfjørð 12. februar 2008.

2 umboð skulu verða vald, uppskot um minst 3 valevni skulu vera sjúkrakassanum í hendi innan 25. februar 2008

**Sjúkrakassi Fuglafjarðar Læknadømis**